# Tolið tapini

**HONDBÓLTUR**

## Dugir tú at snara einum tapi á høvdið og hugsa konstruktivt, so er tað læruríkt at tapa og fáa ein ordiligan undir vangan, heldur Jan Pytlick, danskur landsliðsvenjari. Hann var í Føroyum um vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

Jan Pytlick verður biðin um at seta orð á, hví menniskju elska at vinna.

– At vinna er ein týðilig staðfesting av, at uppgávan er væl úr hondum greidd. Tú kann hyggja aftur á eina langa tilgongd og siga, at tað er eingin, sum hevur dugað eins væl. Vit eru komin á mál og hava rokkið nøkrum málum. Vit vinna og fáa kensluna av at eydnast. Tí er hinvegin ikki undarligt, hví vit hata at tapa. Tá hava vit gjørt nakað skeivt og iðra okkum um, hví vit ikki gjørdu øðrvísi, tekur 43 ára gamli hondbóltsvenjarin til.

Jan Pytlick hevur verið millum bestu donsku hondbóltsvenjararnar í nógv ár. Hann hevur drúgvar royndir sum maðurin á síðulinjuni. Pytlick hevur havt evstu ábyrgdina av danska kvinnulandsliðnum í tveimum reisum við glæsligum úrslitum.

Gullmerki frá olympisku leikunum, heimsmeistarakappingini og evropameistarakappingini prýða millum annað hansara steypaskáp.

### Avloysti Wilbek

Jan Pytlick tók við sum landsliðsvenjari hjá kvinnum í 1998.

Ulrik Wilbek hevði vunnið liðið upp á ovastu tindarnar í altjóða hondbólti, tá tað brádliga stóð távarandi 30 ára gamli Pytlik av Thurø at loysa mest vinnandi danska venjaran av og standa á odda fyri heimsins besta kvinnuliði. Avbjóðingin var møtumikil. Hann var greiður yvir, at tað kundi nærmast bara fara ein veg. Hann vísti fyrst tilboðnum aftur, áðrenn hann segði seg vera sinnaðan at royna seg.

– Tess størri og torførari avbjóðingin er, tess størri er vandin fyri at mislukkast. Hinvegin er ofta neyðugt at leypa út í tað, uttan at hugsa um vansarnar. Vit læra eina rúgvu um okkara persónligu eginleikar, tá vit kroysta okkum út á markið. Dugir tú at snara einum tapi á høvdið og hugsa konstruktivt, so er tað læruríkt at tapa og fáa ein ordiligan undir vangan. Tá veitst tú, hvat krevst. Tað ræður um at duga at tapa og at duga at vinna, vísir Jan Pytlick á.

Hann hevði fyrilestur fyri føroyskum ítróttarvenjarum um vikuskiftið. Hann greiddi teimum frá, hvussu tú byggur upp eitt vinnaralið frá grundini.

### Tak móti øllum

Jan Pytlick býr á Thurø. Hann er útlærdur múrari og arbeiddi eitt skifti hjá pápa sínum, ið sítt egna múraravirki. Pytlick var íðin hondbóltsspælari, men noyddist at geva skarvin yvir sum 19 ára gamal. Boðini frá læknanum vóru greið. Hann varð illa skaddur í økslini og fór ongantíð at spæla hondbólt aftur. Hann var heldur ikki førur fyri at arbeiða. Tá fór Pytlick undir yrkisleiðina sum venjari, og 31 ára gamli Jan Pytlick hevði staðið á odda fyri Team Esbjerg og GOG, tá tað stóð hinum í boði at vera landsliðsvenjari í 1998.

Úrslitini vóru góð. Danska kvinnulandsliðið vunnu olympisku leikirnar í 2000 og 2004, umframt evropameistaraheitið í 2002.

Jan Pytlick sigur, at, hóast hann hevur evstu ábyrgdina av liðnum, so samstarvar hann við leikarnar um endaligu avgerðirnar. Tað torførasta við venjarayrkinum er hinvegin at fáa spælararnar at reisa seg aftur sinnisliga.

– Menniskju sveiggja nógv mentalt. Summar tíðir eru vit heilt á tindinum, men aðrar tíðir vil einki, sum vit ynskja. Tað er torført at fáa spælarar at reisa seg aftur eftir eitt tap. Soleiðis er hjá øllum. Tað er skjótt at missa alt á gólvið. Avbjóðingin er at koma fyri seg aftur, og tað krevur nógv av okkum. Tá vit hinvegin hava funnið fótafestið aftur, hava vit lært ómetaliga nógv, sigur Jan Pytlick.

Hann var gestur í Hvonn Live leygarkvøldið.

*uni@sosialurin.fo*




*– Tess størri og torførari avbjóðingin er, tess størri er vandin fyri at mislukkast. Hinvegin er ofta neyðugt at leypa út í tað, uttan at hugsa um vansarnar, sigur Jan Pytlick*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




*Gullmerki frá olympisku leikunum, heimsmeistarakappingini og evropameistarakappingini prýða millum annað steypaskápið hjá Jan Pytlick*

## FAKTA:

**Navn:** Jan Pytlick
**Føðingardagur:** 5. juni, 1967
**Aldur:** 43 ár
**Bústaður:** Thurø
**Útbúgving:** Múrari
**Starv:** Hondbóltsvenjari

**Yrkisleið:**
- GOG, kvinnur, 1991-1995, 2006 –
- Team Esbjerg, menn, 1995-1997
- GOG, menn, 1997-1998
- Danmark, kvinnur, 1998-2005, 2007 –